Tónleikasending til útbjóðingar

Arbeiðsheiti: Gospelsending
Miðil: Útvarp/heimasíða
Hvat: Ein vikulig tónleikasending í vetrarskránni 2020/21, t.e. frá september 2020 til juni 2021
Longd: 50 minuttir
Innihald: Gospeltónleikur
Staðseting: Mentan, Kringvarp Føroya
Redaktionell ábyrgd: Mentan

LÝSING

Talan er um eina vikuliga tónleikasending við gospeltónleiki. Sendingin skal spæla nýggjan og eldri gospeltónleik og fevna um ymsu greinarnar innan gospel.

KRØV TIL TILBOÐSGEVARA

Gott føroyskt mál, góða útvarpsrødd og holla vitan um, hvat rørir seg í tónleikasjangruni, gospel.

KRØV TIL TILBOÐIÐ

Eina lýsing av, hvussu tú kundi hugsað tær at lagt sendingina tilrættis. Tað veri seg tónleikavalið, hvussu sendingin skal byggjast upp og tín vertsleiklut.

KRINGVARP FØROYA KANN VEITA

- Upptøkuhøli
- Atgongd til savn
- Keyp av gospeltónleiki
- Útgerð
- Ljóðtøkning
- Redaktør

KVF tilskilar sær rættin til at leggja dent á yrkisføri, persónligar eginleikar hjá verti og á veitingartrygd.

KVF tilskilar sær somuleiðis rættin til at vraka øll innkomin tilboð.

Freistin at bjóða seg fram til at gera sendingina er 16. august 2020

Umsókn skal sendast til teldubústaðin: utbod@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við sjey limum stjórnar stovninum.
Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum.
Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting.